LM-099/2023

Jógvan Magnusson
Í Dúvugørðum
Saksunarvegur 41
FO - 436 Saksun
Fart. 00298 722303
E-post. jmj@kallnet.fo

21-02-2024

Fylgiskjal 29

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Tinganes

Ummæli av uppskoti til Ferðavinnulóg.

Flestu vantaðu helst eitt vánaligt úrslit tá hetta uppskoti kom tí gjógvin millum bygd og bý er stórri nú enn nakrantíð.
Hjá okkum á bygd er tað vanlig vitan at býarfólkini hava minni og minni vitan um bygdaslig viðurskiftir.
Men at hetta bara skuldi roynast at verða eitt vánaligt kopi av uppskotinum sum Vinnumálaráðið (Les VFI) gjørdi meðan Helgi Abrahamsen sat sum landbúnaðar- og ferðavinnumálaráharri var verri enn vantað.
At lata sama mann umsita bæði landbúnað og ferðavinnu sær ikki út til at bera til.
Hesir hava ikki víst seg at hava evni til at latað landbúnað verða landbúnað og ferðavinnu vera ferðavinnu.
Tað hevði borið sera væl til um landsstýrismaðurin ístaðin fyri at selja ferðavinnuni landbúnaðarlógir álegði ferðavinnuni og fyrst og fremst VFI at reka ferðavinnu samsvarandi galdandi lógum í landinum.
Tá uppskotið var lagt fram segði Høgni Hoydal at tað gjørdi seg ikki inn á landbúnaðin.
Tað ferðina segði hann ósatt – ikki fyri okkum sum kenna landbúnaðin men nakað sum er nógv verri – hann hevur logið fyri sær sjálvum.
Uppskotið strikar § 41, 42 og 43 í Girðingarlógini tí tað er ikki í "samsvar" við uppskotið:

Í § 41 í Lov for Færoerne om Hegn og Markfred frá 1937 er ásett, at ongum er loyvt at ganga uttan fyri beina bygdagotu í haga, har hann ikki er eigari. Henda avmarking í gongurættinum, sum er grundað á landbúnaðarfyrilit, er ikki í samsvari við reglurnar í hesi logtingslógini og verður tí strikað. Víst verður til § 3 og viðmerkingarnar til ta greinina.

Tað er ein mótsøgn at strika greinar í einari lóg sum landbúnaðurin brúkar uttan at seta nakað ístaðin.
Hogni Hoydal veit at landbúnaðurin brúkar lógina tí tingbólkur tjóveldisins fekk tað at vita frá undirritaða á fundi meðan Helgi Abrahamsen sat við vinnumálum.
Nú verður dentur lagdur á at ferðafólk skulu hava frítt at fara men tað er ikki tað sum lógin er ætlað til.
Hon er ætlað at bannað bondum og roktingarmonnum at ganga og reka seyð inni hjá oðrum.

Vit kunnu taka Norðurstreymoy sum domi.
Í Saksun eru 4 hagar. Kvíggjarhamar hevur 5 grannar. Dúvugarðar hevur 10 grannar. Svartá fyri Niðan hevur 4 grannar og Svartá fyri Uttan hevur 4 grannar. Talan eru um hagar sum liggja í 6 ymiskum markatalsbygdum.
Saksun, Tjørnuvík, Haldarsvík, Streymnes, Hvalvík og Vestmanna.
Leggi til merkis at ikki ein einast stubbi av girðing er á markinum millum nakran haga ella nakra markatalsbygd.
Tað hevur ikki verið neyðugt tí vit halda § 41 í Girðingarlógini sum er sama áseting sum er í

Seyðabrævinum frá 1298.
Hendan lógin hevur skipað og skipar gongd í øllum høgunum fyri bøndur og óðalsmenn og soleiðis hevur verið her á landi síðani landnám.
Fyrstu fer vit hava skrivaða keldu um hesa fyriskipan er í Seyðabrævinum.
Ongin av teimum sum varða av høgunum gongur inn í annan haga eftir sínum seyði uttan at avtala sambært § 42 í somu lóg.
Seyður sum er lagstur í skeivan haga verður rikin í rætt í tí haganum og latin eigaranum eftir;

§ 10. Røktingarmenninir skulu standa fyri seyðarøktini, fjallgonguni og markingini og eisini øllum øðrum arbeiði í haganum. Teir eiga at ansa eftir, at avgerðirnar um skipanina í haganum og avgerðirnar um frið í haganum (sbr. §§ 20-22, 26-29, 31, 41-43 í hegnlógini/girðingarlógini) verða hildnar, og øvugt at ágongan í haganum ikki gongur inn á fremmanda ogn, soleiðis at hagaeigararnir verða fyri missi og ábyrgd av hesum. Teir gera av um uppslepping og tøku, tá ið eigari ella stýrið ikki hava gjørt hetta.

Legg til merkis at her verður víst til m.a. § 41-43 í girðinagarlógini.
Hvat nú tá hon verður strikað??
Tað er nógv sum bendir á at tey sum hava gjørt lógaruppskotið í Landbúnaðarmálaráðnum helst hava havt sera, sera, sera lítlan kunnleika til seyðarøkt í stórum høgum har eingi hegn eru.

Leggjast skal afturat at so at siga ongin av hesum høgum er nakað av týdningi av ferðavinnu.
Í Dúvugarðahaganum sum hevur 10/11 garnnar er als eingin "gongd í haga" --- kortini strikar man §41 í girðingarlógini sum er treytin fyri at hagin og hagarøktin kunnu virka.
Og nú ætlar man at filla lógina sum skipar røktina í hesum høgum fyri at frítt skal verða at ganga hjá ferðavinnufyritøkum í miðstaðnum eini 5-10 øðrum høgum og í øðrum bygdum enn nevndar eru í dóminum.

Tá § 41, 42 og 43 verða strikaðar hava ikki bara ferðafólk frítt at ganga – tað hava bøndur og røktingarmenn eisini.
Tvs. At 10/11 grannar kunnu ganga og røktað sí seyð í haganum sum einans er skipaður at rúma teimum uml. 290 ónum sum eru skipanin.
Og tá hevur Ferðavinnulógin gjørt seg inn á landbúnaðin.
Avleiðingin av tí fer at vera at allir hagar fara at girða seg inni tí lógin sum skipar grannalagið er burtur.
Hetta verður ein nýggj og sera, sera kostnaðarmikil útreiðsla sum á ongan hátt er burðurdygg og púra óneyðug um Girðingarlógin hevði fingið frið í sínum ætlaða líki.
So her sigur Høgni Hoydal og lógaruppskotið ósatt.
Hetta ger seg inn á landbúnaðin og er ikki burðardygt.
Tað er ikki burðardygt tí hetta hevur ein óneyðugan kostnað við sær og hetta stórskemmur náttúru okkara álvarsliga tá girðingar verða um allar Føroyar tí landbúnaðarmálaráðharrin ikki skilti lógirnar sum skipa seyðahaldi og røkt av høgum.

Tað eru fleiri lógargreinir í Hagalóðini, Girðingarlógini og Grannastevnulógni sum eru ávirkaðar av hvørji aðrari.
Um pilkað verður við hetta sambandi sum t.d. at strika § 41-43 fer hetta samspæli í fillir og góðu grannaløgini millum hagar fara fyri skeyti.
Hetta skilja tey sum hava snikkað lógaruppskoti ikki.
So um uppskotið verður tillóg fara ferðavinnuoligarkarnir í Havn kunnu brúka allar Føroyar til ferðavinnu – tað somu ferðavinnuna sum hevur riggað fínt – inntil ferðavinnan við VistFaroeIslands á odda fóru at bróta landbúnaðarlógirnar sum galda í hesum landinum.
Tað einast sum kravdist var ikki at broyta nakra lóg men at viðkomandi landsstýrismaður í ferðavinnumálum hevði so frætt av skili og rygg at hann álegði VFI at reka ferðavinnu sambart lógum sum vóru og eru galdandi.
Allir hesir 16 hagarnir sum eru í dominum úr Saksun hava sera gott samskifti, oll sum hava við

LM-099/2023

hagarnar at gera eru vinfólk orsaka av at vit hava eitt lógarverk sum er tilevna júst til seyðahaldið í Føroyum.
Allir hagarnir ganga samgongu hvør hjá øðrum eftir § 31 í hagalógini.
Hetta fer at fella burtur tá øllum verður loyvt at ganga sum teimum lystir eftir at §41-43 eru strikaðar.

Høgni Hoydal & Co. eru í ferð við at skaða landbúnaðin og seyðahaldið av berari býttheit.
Tey tosa um at ansa eftir í lembing, tá skotnar vera harur, undir rakstri og annað vrøvl.
Hatta hevur verðandi lóg gjørt í 1000 ár. Trupulleikin er bara at hon verður ikki hildin.
Fer nýggja lógin at veða hildin? Hví skal hon verða hildin tá tann gamla ikki var?
Er tað vanligt tá lógarbrot verða framd at man so bara broytir lógina so hon passr til lógarbrotið?

Enn kunnu hasi tjóðarbyggingarfólkin í Tinganesi náa at gera sær sjálvum og okkum øðrum eina tænastu og tað við at tey koyra hatta kopiið av einunm uppskotið sum Helga Abrahamsen gjørdi í berum ráðaloysi í skrell og fara einaferð fyri allar at áleggja VFI og ferðavinnfámannaveldinum í Havn at halda landsins lógir!!
Tað skuldi verið gjørt fyri 12 árum síðani tá VFI varð stovnað!!
VFI hevur sjált spilt allar sínar møguleikar fyri vælvild orsaka av síni rovdrift!!

Uppskotið er ein stór skomm.

Hvar er okkara stoltleiki?
Hvar er tjóðarbygging okkara?
Hví eru vit ikki errin av at vísa allari verðini at vit hava haldførar ódeyðiligar 1000 ára gamlar landbúnaðalógir viðvíkjandi okkara høgum og seyðahaldi?
Hví gera politikarar seg til trælir hjá einum fámannaveldi sum bara hugsar um sín búk?
Hví gera vit í Føroyum sum hava fínar lógir eitt lógaruppskot við donskum lógum sum fyrimynd og selja Føroyar fyri 150 kr?

****
Eitt annað løgið og illa umhugsað í uppskotinum er í § 4:

Stk. 2. Loyvt er at brúka bát á vatnum og í stutta tíð at draga smábát upp á strondina og brúka bátabrúgv og tílíkt, um hetta ikki er eigara ella brúkara til órímiligan ampa.

Vit vita at hetta er tikið úr donskum og í Danmark kanst lenda við báti á flestu strondum.
Í Føroyum eru ikki hesi viðurskiftir. Her eru bara fáar víkir í firðum og sundum har væl er lendandi.
Restin er klettar, bjørg og urðar.
Ætlar man at seta somu treytir fyri at lenda í Sandagerði sum undir Saksunarbjørgunum?
Skal hvør Hanus og Janus kunna lenda í Nýggjuurð undir Mýlingi? á Lónni í Saksun? í Dalagjógv?
Í Seyðskoragjógv, Vesturi á Vikum? Ella undir Ennibergi?
Vit hava ikki gloymt rukkulívið sum flerir ferðir hava staðist av kajak-rógvarum og útferðarbátum við ókønum skiparum sum hava sett fólklív í vanda ti tey kendu ikki streym ella sjóvarfall.
Hesi nevndu stoð eru í ringastu farvotnum í Føroyum. Hetta eru ikki kyrrar sandstrendur sum í Danmark.
Er hatta "burðardygt"???
Nei hatta er beinleiðis "skítfarligt" og váttar hvussu illa rithovundarnir til uppskotið hava skilt viðurskiftini í Føroyum.
Hatta er sum tá børn og fávitar droyma um eina ferðavinnu við ongum skili.

VisitFaroeIslands hevur ongantíð ætlað at rikið ferðavinnu sambært føroyskum hagalógum.
Tað prógvar seg sjálvt tá hugt verður eftir lýsingartilfari stovnsins.
Tað prógvar eisini at bóndi kendi seg noyddan at kæra lýsingar í faldara til Brúkaraumboðið.
Hetta var eftir at hann hevði havt samband við VFI sum bara vísti málinum frá sær til

LM-099/2023

lýsingarfyritøkuna.
Kæran sæst her:
Betri vegleiðing til, hvar ferðafólk kunnu ganga - (bruk.fo)

VFI ella rættari Guðrið Højgaard og Vinnumálaráðið heva alment sagt at eingin lóggáva er á økinum.
Ok – um eingin lóggáva er á økinum? Hví er so neyðugt at strika § 41-43 í Girðingarlógini?
Tað er tí at tað er júst lóggávan sum er. Um eingin lóggáva var so var jú ikki neyðugt at strika nakra sum helst lóggávu!
VFI og Vinnumálaráðið hava eisini sagt at lógin var bara fyri seyða- og torvtjóvar.
Tað prógvar at tey hava als yvirhøvur ikki skilt hvussu lógin virkar í dagsins seyðahaldi og hagarøkt har nógvir hagar liggja ógirdir.
Tey hava eisini samanborið samskiftið millum ferðavinnu og hagar sum at støðan líkist "Wild West"- tilstandum!
Men her hava tey misskilt!
Tað eru ikki hagarnir men ferðavinnan sum hevur víst atburð sum eyðkendi Wild West tann tíð tað var.
Landbúnaðurin og serliga seyðahaldið hava verið skipaði við haldførum lógum síðani landnám – hvussu kann ein nýggj vinna koma sær í klandur við landbúnaðin og krevja landbúnaðarlógir strikaðar???

Mælt verður til at lóg um Burðardygga Ferðavinnu skal byggja á galdandi lógir og at lógir sum eru í brúki dagliga ikki verða strikaðar: (Dømi: § 41-43 í Girðingarlógini).

Hesin atburðurin hjá umsitingini at landbúnaðurin skal víkja fyri ferðavinnuni ger at ferðavinnan er illa umtøkt í Føroyum – og tað er "at skjóta seg í fótin"!!

Jógvan Magnusson
Í Dúvugørðum